

Sambandsflokkinum. Tí skal eitið av eini yvirtøku nú smokka sum ein dinosaurur í danska mýrulendinum. Einasta tjóðskaparliga ambitiónin hjá sitandi samgongu er niðurbundin av donskum áhugamálum, menn megnaðu ikki at bróta imperialistiska skalið í hesum avgerandi málið fyri føroysku tjóðina. Spurningurin er tí relevantur, um Jógvan á Lakjuni bara er hentur býttlingur í hondunum á donsku statsmaktini, og um kravboðini, sum mega vera komin onkustaðni frá, um ásetingarnar omanfyri, eru komnar av Sláturhólmanum í Keypmannahavn, ella er tað veruliga so livandi galið, at høvdið á føroyskum stjórnarmonnum bara er so forskrúvað, at teir ikki síggja út um donsku eingjargarðarnar?

Føroyingurin krevur sambært lóg, tað billi eg mær bara inn, skilji í hvussu er onki annað, at eittans mál verður brúkt í eini komandi føroyskari kirkju, føroyskt. At kristindómurin, uttan undantak, bara verður boðaður á føroyskum máli í kirkjunum, og at tað undir ongum umstøðum verður lóggivið fyri, at fremmant hervald hevur serligar sømdir í føroyskum halgidómum. Hendir hetta, er tað eitt paradoks, sum slær øll galdandi heimsmet, og føroyingurin hevur lóggivið fyri síni egnu undirbrotligheit. Appropos fólkatkvøður, so ivist eg onga løtu í, at ein slík hevði varpað eitt lógaruppskot, sum hetta frá Lakjumanninum, har sum piparið grør. Tað hevði líkst sovjetiskum tilstandum, eini 99% av fólkinum hevði atkvøtt fyri, at her gekk í hvussu er gáttin fyri fremmandum valdi og tanka. Her skula føroyingar og føroyskt mál ráða fyri borgum. Ongin undir og ongin undir liðini á hesum lívgevandi og stabiliserandi løki fólksins. Omanfyri bara ein, sum skilir føroyska tungu eins væl og øll onnur heimsins tungumál. Vælsignaði tit sum fyriskipa. Hetta snýr seg ikki um strategiir og taktikk, bara um ábyrgd, álit og trúgv sum er treyst í tí, ið vónað verður, sannføring um teir lutir, sum ikki eru at síggja.

Lati okkum fáa málið á beint aftur. Gera enda á duldu dagsskráunum. Annars syndrast kirkjan í óneyðugum stríði. Til óbótaligan skaða fyri land og fólk. Sum landið liggur, eru føroyingar í holt við legitimera donsku fatanina, í ferð við at senda kirkjuna niður har, sum hon ongantíð hevur átt jørðildi. Í láglendið suðuri við Oyrasund. Skuldi onkur ivast, so er embætismaðurin, Bergur Berg, ósekur í hesum grima leiki, hann ger bara eftir politisku kravboðunum frá Lakjumanninum, og havi eg gjørt politiska fylgibólkinum órætt og ónáðir, ongin kennir definitiónina um teirra leiklut og ávirkan, so hevði frægast verið, um rættingar komu fram á torg til harmin og glepsini, sum lógu og liggja mær á hjarta. Kirkjan má fyri alt í verðini ikki enda sum fótatraðk í glymum dansi – sum kíkur í partapolitiskum heksadansi og spæli. Hennara fótafestið eigur bit á aðrari rók – í aðrari sferu – hátt hevjað yvir gerandisligan glantrileik, gartan og lítlan semjuleika.

Vónandi eru vit ikki tikin so við nøsini, í berum bláoygni, at løðingin í yvirskriftini nakrantíð gerst kaldur veruleiki. Niður við fólkakirkjuni? Sum hevur verið integreraður partur av føroysku fólkasálini í túsund ár og meira afturat, við føroyskari hjálp aleina? Tað ber ikki til, royndin og destruktivi galesjutúrurin hjá samgonguni, og serliga Jógvani á Lakjuni, má steðgast alt fyri eitt. Tað skylda vit í øllum førum eftirkomarunum, ið helst skula arva tjóðina í best skikkaðum standi, soleiðsni, at hon hóskiliga kann flytast víðari fram á vegin - tað verið seg í materiu, anda og trúgv.

# Posagongd áðrenn Blix og Clinton koma

KARIN KJØLBRO



24. mai verður tað, at lítla sandskornið á dansigólvinum hjá William Heinesen verður til heimsins nalva. Nú er møguleikin har. Føroyar koma av álvara á heimskortið. Útflutnings- og ferðamannavinnan og Norðurlandahúsið ikki um at tala fáa ein gyltan møguleika við teim tíðinda- og myndafólkum úr øllum heimi, sum koma við Blix og Clinton, men *gløgt er gestsins eyga*.

Vit mugu gera okkum greitt, at verður ljóskastarin settur á okkum, so er tað ikki bert nattúran,sum vit fegin vilja vísa fram, ið sæst, men so mangt annað, ið vit helst vildu var ósjónligt. Hóast nógv hevur verið gjørt, so er tað alsamt so, at á alfaravegi er nógvastaðni bæði skitið og óruddiligt við alskins burturkasti. Óivað verður snøgt og hampuligt á rutuni hjá fyrrverandi forsetanum, men tey, ið steðga nakrar dagar, kunnu fáa annað at síggja, um vit ikki taka okkum um reiggj. Ein gongd leið kundi verið at skipa fyri posagongd. .

Til tey, ið kanska ikki vita, hvat posagongd er, so snýr tað seg um at ganga í náttúruni og á vegnum og hava stóran posa við. Hvørja ferð tú sært burturkast , so tekur tú tað upp og koyrir í posan – hugsi tó ikki, at tað hundar og hundaeigarar leggja eftir sær, hoyra uppí hetta upptak-. Tú brúkar fleiri kaloriur, enn tá tú bara gongur, og sostatt røkir tú bæði kropp, sál og náttúru. Eyðvitað er hetta ikki nóg mikið, men tað ger mun, og vit kunnu fyribyrgja, at møguligir komandi gestir og keyparar ikki missa hugin í forhond.

Tað er so mangt annað, ið er neyðugt, men tað er so ein byrjan, ið hin einstaki kann medvirka í.

Nú heimurin er um at kódna í burturkasti og hita, kunnu vit við náttúru okkara, fiski og fiskaúrdráttum úr reinum havi og reinum og ruddiligum umhvørvi júst vera tað heimurin og heimsborgarar fara at tráða eftir, tá tey síggja myndirnar úr Føroyum.

# Sleppur føroyingurin til arbeiðis

JÓHAN CARL DAM
nevndarlimur í Havnar Arbeiðsmannafelag



Vit hoyra javnan stjórar hjá Føroya Fiskavirking úttala, at vit mangla arbeiðsmegi á okkara fiskavirkjum. Hesir somu stjórar rópa tí eftir fremmandari arbeiðsmegi. Teir siga, at kemur eitt stórt tal av fremmandum fiskavirkisarbeiðarum ikki til Føroya í skundi, so fer fiskivinnan at missa ein hóp av peningi. Sagt verður eisini, at tað ber ikki til at finna skikkaða arbeiðsmegi til flakavirkini skjótt. Nú eru politikarar eisini farnir at taka undir við stjórunum á Føroya Fiskavirking. Ein fólkafloksmaður, sum rópti útlendingar fyri líkt og ólíkt undan valinum seinast, hann stendur nú í fremstu røð og rópar eftir útlendskari arbeiðsmegi. Sambært honum, so koma ongantíð ov nógvir útlendingar henda vegin at arbeiða.

**Føroyingar vilja fegnir**

Men er tað nú rætt, sum stjórar og politikarar royna at fortelja okkum. Nú kenni eg ikki so lítið til støðuna hjá arbeiðarafjøldini her á landi. Og má eg siga, at eg kenni einki til, at fólk hvørki tíma ella eru óskikkað til at útinna tað arbeiði, sum ávísir vilja hava útlendingar til at gera. Heldur er tað øvugta galdandi, at tað heldur er reglan enn undantakið, at okkara flakafólk hava alt ov stutta og óreguliga arbeiðsviku. Eg veit um nógv flakafólk kring landið, sum vildu gjørt og givið nógv fyri at sloppið meira til arbeiðis. Til dømis kundi Føroya Fiskavirking gjørt tað at fólk, sum eru knýtt at einum virki, kundu verið nýtt á øðrum virki, tá tørvur var á arbeiðsmegi har. Men tað vilja teir á Føroya Fiskavirking ikki hoyra talan um. Teir vilja hava útlendingar inn á øll virkini, sjálvt um føroyingarnir á somu virkjum langt frá hava fulla arbeiðsviku. Kanska eiga teir á Føroya Fiskavirking at fara undir eina skipan, har fólk verða sett í fast starv, og at tey so kunnu flytast millum virkir, tá hetta er neyðugt. Her síggi eg upplæring og útbúgving sum eina sjálvfylgju. Hesum eiga arbeiðarafeløgini at virka fyri.

**Hví útlendingar**

Ein kann undrast yvir, at teir á FF eru so altráðir eftir útlendskari arbeiðsmegi. Eri stórliga í iva um teirra pástandir um, at útlendingarnir eru raskari og dugnaligari. Nei, heldur er tað okkurt annað, sum drívur verkið. Stjórarnir í Føroya Fiskavirking síggja kanska aðrar møguleikar við útlendsku arbeiðsmegini. Teir rokna við, at teir fáa útlendingarnar at arbeiða í døgndrift fyri undirløn. At teir kunnu taka teir inn í landið upp á serligar treytir í ávísa tíð. Vit hava sæð dømi um hetta á Skála, og nú vilja teir í Føroya Fiskavirking ganga somu leið. Teir vilja heldur hava útlendingar fyri 40 krónur um tíman og uttan fakfelagsbinding, enn føroyingar, sum sjálvandi krevja sáttmálaviðurskiftini hildin. Bæði so og so. Ein vandi við at flyta inn arbeiðsmegi til flakavinnuna er, at arbeiðsgevarin skal tryggja hesum útlendingunum 40 tíma viku. Koma fleiri útlendingar inn upp á hesar treytir, so vita hvørjar treytirnar hjá føroysku flakafólkunum verða. Tey verða send til hús.

**Skulu vera vælkomnir**

Hetta skal als iki skiljast soleiðis, at útlendsk arbeiðsmegi ikki er vælkomin til Føroyar. Føroyingar eru allastaðni, so hví kunnu útlendingarnir ikki koma her. Teir skulu vera so hjartaliga vælkomnir, og vit eiga at gera alt fyri, at teir hava tað gott og kenna seg væl, meðan teir eru her. Vit eiga bert at gera upp við okkum sjálvi, at nakrar meginreglur skulu galda í mun til útlendingar. Eins væl og vit seta teimum treytir, so eiga vit eisini at veita teimum sømdir. Vit krevja av teimum, at tey skulu tillaga seg okkara samfelag, okkara siðir, lógir og reglur. At tey virða og liva sambært okkara mentan í tann mun, tað ber til. Hinvegin skulu vit bjóða teimum sømdir og treytir á sama støði, sum vit bjóða øllum øðrum. Somu løn, somu arbeiðstreytir, búumstøður og so framvegis.

Men vit eiga undir ongum umstøðum at bjóða útlendingum tað arbeiði, sum føroyingar standa og mangla og fegnir vilja átaka sær. Vit mugu ikki lata kraddaralyndið og grátigheitina fara við okkum. Vit eiga at fáa málið væl lýst, vit eiga at fáa spurningin svaraðan, um føroyingurin er skikkaður til at skera flak, um hann tímur at skera flak, og um hann sleppur til arbeiðis í tann mun, hann ynskir tað.